## Úr Løgtinginum





# Tómur tingsalur

JOHN JOHANNESSEN

Einans 20 av teimum 32 tinglimunum vóru til 59. tingfundin hesa tingsetuna, ið varð hildin hósdagin. Illveður var, og helst eru fleiri av tingfólkunum ikki sloppin til Havnar á tingfund í vánaligu líkindunum.

Til tingfundin vantaðu harafturat Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, og ríkisumboðskvinnan, Vibekke Larsen.

Tinglimirnir, ið ikki vóru á fundi, vóru Eyðun Viderø, Jógvan á Lakjuni, Rúna Sivertsen, Ingi Olsen, Jógvan við Keldu, Hans Pauli Strøm, Dan R. Petersen, Jóannes Eidesgaard, Alfred Olsen, Marjus Dam, Sámal Petur í Grund og Hergeir Nielsen.

Tingfundurin varð kortini hildin, sum vanligt, hóast trý mál vórðu tikin av dagsskránni.

# Tvær fyrstu viðgerðir

JOHN JOHANNESSEN

Umframt atkvøðugreiðslu um fyrispuring nummar 100-25/1999 til Karsten Hansen, landsstýrismann, frá Jóannesi Eidesgaard, løgtingsmanni viðvíkjandi sokallaðu Demm-skipanini og innkrevjingardeildini hjá Tolli og Skatti, vóru tvær fyrstu viðgerðir á skránni fyri tingfundin hósdagin.

Tær báðar fyrstu viðgerðirnar vóru av tingmáli nummar 53-5/1999, sum er grannskoðan av almennum roknskapum, og var tað í hesum føri talan um roknskapin hjá Postverki Føroya fyri fíggjarárið 1998. Málið varð beint beinleiðis til aðru viðgerð.

Seinna fyrsta viðgerðin var av tingmáli nummar 53-7/1999, sum er grannskoðan av almenna roknskapinum hjá Gunninum fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu fyri fíggjarárið 1998. Eisini hetta málið varð beint beinleiðis til aðru viðgerð.

Tingfundurin nummar 59 hesa tingsetuna var lokin klokkan hálvgum fimm hósdagin.

# Trý mál av dagsskránni

JOHN JOHANNESSEN

Trý mál vórðu tikin av dagsskránni fyri tingfundin hósdagin. Eitt av málunum var fyrsta viðgerð av tingmáli nummar 55/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um vatnið í Sumbiarbergholinum. Hetta er mál, ið Finnbogi Arge, landsstýrismaður, legði fyri tingið 22. februar í ár.

Ein onnur fyrsta viðgerð varð eisini tikin av dagsskránni. Hetta var fyrsta viðgerð av tingmáli nummar 61/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um endurgjald til kommunur í sambandi við, at sjóvegis farleiðir hjá Strandfaraskipum Landsins verða lagdar niður. Hetta málið legði Finnbogi Arge, landsstýrismaður, fyri tingið 29. februar.

Svarið, sum Signar á Brúnni skuldi geva Jógvani á Lakjuni um summarfrítíðina hjá miðnámsskúlunum varð eisini útsett.

Tingfundur var aftur í gjár, og tá vóru øll hesi mál á skránni.

# Eingin meiriluti funnin

*Nú uttanlandsnevndin er liðug við álitini í fullveldismálinum, er heilt greitt, at hon ikki rakk nógv umrøddu breiðu semjuni*

JOHN JOHANNESSEN

Hóast landsstýrið fleiri ferðir hevur víst á, at breið semja fór at finnast í uttanlandsnevndini fyri fullveldismálinum, eydnaðist hetta ikki. Hetta fingu vit heilt greitt staðfest frá uttanlandsnevndarlimunum í gjár, hóast blaðið fór til prentingar áðrenn endaligi fundurin, ið byrjaði klokkan trý, var liðugur.

Tað hevur nevniliga ikki eydnast nevndini at fáa gjørt eitt felags álit í málinum, og heldur ikki hevur tað eydnast at fáa Miðflokkin at skriva álit saman við samgonguflokkunum.



*Eyðun Viderø, Jógvan Durhuus og Hans Pauli Strøm tosa í gongini á veg av fundi í uttanlandsnevndini. Mynd: Álvur Haraldsen*

### Tveir møguleika

Áðrenn seinasta fundin seinnapartin í gjár, vóru øll útlit fyri breiðari semju rokin. Tá sóðust bert tveir møguleikar, ið hvørgin gav breiða semju. Annar var, at samgonguflokkarnir skrivaðu eitt felags álit, meðan andstøðuflokkarnir hvør í sínum lagi komu við einum áliti. Hin møguleikin var, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin samdust um eitt felags álit, eins og samgonguflokkarnir, meðan Miðflokkurin framvegis stóð einsamallur.

Undir øllum umstøðum er eingin av hesum møguleikunum grundarlag fyri breiðari semju, hvørki millum teirra, ið taka undir við ætlanum landsstýrissins ella teimum, ið eru ímóti ætlanum landsstýrisins.

### Tó ikki svart hvítt

Men málið er kortini ikki bert svart og hvítt. Tað eru eisini flokkar, ið ynskja broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum, um ikki á sama hátt, sum samgonguflokkarnir.

Javnaðarflokkurin boðaði á landsfundi herfyri frá, at hann ikki tekur undir við ætlan landsstýrisins, og tí ikki fór at stuðla henni. Men flokkurin hevur tó boðað frá, at hann ynskir meira sjálvstýri. Hann vil yvirtaka málini, so hvør føroyingar eru førir fyri tí, í staðin fyri at taka yvir øll mál, eins og landsstýrið vil.

Sambandsflokkurin vil eisini broytingar, um ikki so víðgongdar, sum Javnaðarflokkurin. Tí sita hesir báðir flokkar í skrivandi løtu og arbeiða við at fáa í lag eitt álit, teir í felag kunnu leggja fyri uttanlandsnevndina.

Miðflokkurin sigur seg virða samráðingarrættin hjá landsstýrinum, men hevur kortini skrivað sítt egna álit. Hetta heldur hann vera skilabest, hóast flokkurin, eins og samgongan, vil hava broytingar í ríkisrættarligu støðuni.

Í sambandi við, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava arbeitt saman um felags álit, hevur Jenis av Rana ført fram, at verður hetta veruleiki, er breiða semjan longu funnin, tí tá hevur Javnaðarflokkurin togað Sambandsflokkin á slálvstýrisleið.

### Uppritið almannakunngjørt

Tað eydnaðist ikki Sosialinum at fáa fatur í úrslitinum av seinna fundinum hjá uttanlandsnevndini, áðrenn blaðið fór til prentingar. Men væntandi var, at uppritið varð almannakunngjørt eftir fundin, tá landsstýrið hevði fingið álitini.

# Uttanlandsnevndin seinkað

*Landsstýrið fekk ikki, sum vætað, álitini frá uttanlandsnevndini í fullveldismálinum fyrrapartin í gjár*

JOHN JOHANNESSEN

Seinsta fríggjadagin í farnu viku vóru ábendingar um, at uttanlandsnevndin fór at gerast liðug við viðgerðina av fullveldismálinum, og tískil fór at handa landsstýrinum álit hendan dagin.

Fyrrapartin í gjár, eina viku seinni, ætlaði uttanlandsnevndin sær heilt vist at vera liðug við álit síni, so tey kundu handast landsstýrinum. Men so varð ikki.

### Skuldu royna aftur

Uttanlandsnevndin væntaði í gjár eina skjóta viðgerð, har álitini vórðu løgd fram fyri nevndina og síðani latin landsstýrinum. Tí valdi formaður nevndarinnar, Hergeir Nielsen, at leggja fundin klokkan níggju, ein tíma áðrenn tingfundin.

Men allir flokkarnir vóru ikki lidnir við álit síni, og tá klokkan leið móti tíggju og tað nærkaðist til, at tingfundurin varð settur, varð gjørt av at slíta fundin og síðani møtast aftur klokkan trý seinnapartin.



Kristina Samuelsen, skrivari í uttanlandsnevndini, og Heirgeir Nielsen, formaður. Mynd: Álvur Haraldsen

### Seinasti fundurin

Tá Sosialurin prátaði við Hergeir Nielsen, formann í uttanlandsnevndini, beint eftir uttanlandsnevndarfundin fyrrapartin í gjár, segði hann seg vera rímiliga vísan í, at fundurin seinnapartin fór at verða tann seinasti áðrenn álit verða løgd fram.

Hergeir Nielsen vísti kortini á, at hann ikki kundi vissa um, at álit fóru at verða løgd fram efir hendan fundin. Men so var tað tí at okkurt serligt fór at vera á skránni.

– Frá mínari síðu er málið heilt avgjørt avgreitt seinnapartin, segði Hergeir Nielsen eftir fundin fyrrapartin í gjár.



















Kundi tú hugsað tær at verið á úrvalsliði ?

Á virki okkara eru nógvir **góðir leikarar**. Men tað er fyrst og fremst gjøgnum samarbeiði, at vit hava skapt eitt sterkt lið. Nú hava vit pláss fyri nøkrum leikarum afturat, og vit sóknast tí eftir evnaríkum persónum við áræði, ambitiónum og hugi at vera við á einum liði, har nógv er at gera, og har arbeitt verður í einum góðum og óhátíðarligum umhvørvi.

**Rasmussen & Weihe** er eitt grannskoðara- og ráðgevingafelag, sum varð stovnað í 1968. Umframt at gera lógarbundna grannskoðan ráðgeva vit á ymsum økjum, t.d. viðvíkjandi roknskapi, bókhaldi, stovnan av virkjum, rakstrarætlanum, skattamálum v.m. Umframt høvuðsskrivstovuna í Tórshavn hava vit eisini skrivstovuhøli í Saltangará.

Ein **útbúgving** hjá okkum gevur eisini møguleikar uttanlands. Í altjóða høpi er felagið limur í heimsins størstu grannskoðarafyritøku PricewaterhouseCoopers, ið hevur meira enn 150.000 starvsfólk í 150 ymsum londum, og hetta samstarv gevur okkara starvsfólkum møguleikar at fáa sær arbeiðsroyndir uttanlands - í princippinum allastaðni, har PricewaterhouseCoopers er umboðað.

Sjálvandi dámar okkum best, at starvsfólk, ið gera eitt gott arbeiði, ynskja at verða verandi í virkinum hjá okkum. Men vit mugu ásanna, at nógv virki leita sær eftir dugnaligum starvsfólki hjá okkum. Hevur tú **viljan og evnini** til at gjøgnumføra eina útbúgving hjá okkum, hevur tú óivað nógvar møguleikar í framtíðini. Hugsar tú frammanundan um víðari útbúgving í útlondum, átti tú kanska í staðin at hugsa um at komið á liðið hjá okkum.

Sjálvt um vit tilætlað gera alt fyri at varðveita okkara góða og óhátíðarliga arbeiðsumhvørvi, má ásannast, at **grannskoðan** í sjálvum sær er eitt álvarsmál. Endamálið við grannskoðan er at gera tað arbeiði, ið er neyðugt fyri at átekna upplýsingar frá einum virki til umheimin. Ein átekning, ið sigur, um upplýsingarnar eru rættvísandi. Í hesum sambandi er neyðugt at læra, hvussu grannskoðanin skal útinnast, og hvat krevst fyri at gera eina átekning. Í okkara arbeiði verður tó eisini ofta neyðugt at ráðgeva innan ymisk øki, og hartil krevst eisini **teoretisk og praktisk vitan**. Lóggávan setir stór krøv til fakliga støðið hjá einum grannskoðara, men innanhýsis setir felag okkara enn størri krøv til dygdina av tí arbeiði, ið gjørt verður. Talan er eisini um stór krøv til persónligu eginleikarnar hjá einum grannskoðara. Hann skal m.a. vera ábyrgdarfullur, álítandi, trúverdur og skilja týdningin av tagnarskylduni.

Fakliga støðið verður uppbygt gjøgnum **teoretiska útbúgving og starvsvenjing** - sigast má tó beinanvegin, at neyðugt er, at tú sjálv(ur) tekur eitt stórt tak.

Vit vænta at tú hevur tikið ella tekur **students-, HF ella HH prógv** í summar, og at tú ert áhugað(ur) í eini búskaparligari útbúgving. Tú var/er eisini millum tey stinnastu í flokkinum hjá tær og hevur hug at sameina eina teoretiska útbúgving við eina praktiska útbúgving. Eisini heldur tú tað vera spennandi at sleppa at virka í vinnulívinum.

Vit bjóða tær eitt **læruppláss**, har tú í fyrstu syftu kanst lesa HD, samstundis sum tú vinnur pening. Vit geva tær møguleika fyri eini búskaparligari útbúgving, ið ikki fæst betri í Føroyum, og sum til fulnar er á sama støði sum tað, ið verður bjóðað aðrastaðni. Aftan á **HD** hevur tú fleiri møguleikar. Velur tú at lesa cand. merc. aud. sum fulltíðarlesandi í Danmark, kanst tú fáa farloyvi, og kanska kunnu vit útvega tær arbeiði í lestrartíðini hjá PricewaterhouseCoopers í Danmark. Tú kanst eisini velja at lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi, samstundis sum tú arbeiðir í Føroyum. Aftan á cand. merc. aud. er møguleiki at gerast statsautoriseraður grannskoðari. Hevur tú vilja, evni og rættan hugburð, stuðla vit tær sjálvsagt so nógv sum gjørligt í at fullføra tað, sum tú setur tær fyri.

Størvini skulu setast eftir summarfrítíðina ár 2000, men longu í apríl mánaði kunnu vit gera eina setanaravtalu.

Ynskir tú aðrar upplýsingar, kanst tú ringja til okkara og seta teg í samband við Ole Guldborg Nielsen ella Klaus Rasmussen.

Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi ultimo mars 2000.

Grannskoðarafelagið
RASMUSSEN & WEIHE
Statsaut. Revisorar
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi • Box 30 • FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 31 10 17 • Fax (+298) 31 10 18
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo • Http://www.rasmussen.fo

Sosialurin - 311820